# Heimskent gospelnavn á Fjarðafestival



Michael Tait



Pillar



Switchfoot

**Slatrið gongur um Pillar, Switchfoot ella ein fyrrverandi limur úr DC Talk á Fjarðafestivalin**

*Johan Jacobsen*
*Johan@sosialurin.fo*

Leysasøgur hava gingið um, at eitt heimsnavn úr gospeltónleiki er á veg til Fjarðafestivalin. Fyrireikararnir vilja ikki avdúka nakað endaligt, men álítandi keldur vilja vera við, at okkurt er um tosið. Og harafturat er sagt, at eitt av teimum trimum nøvnunum hevur játtað at koma. Hósmorgunin fellur avgerðin. Tá verður tíðindafundur har nøkur nøvn verða avdúka, harímillum hetta heilt stóra navnið.

Hetta, at talan er um ein av áðurnevndu bólkum, er uttan iva søtir tónar fyri fleiri gospel-fjepparar her á landi.

**Switchfoot** er úr Kalifornia USA og spælir gospel-tónleik. Tónleikaslagið er lýst sum alternativur rocktónleikur, power pop, post-grunge. Teir gjørdust kendir innan gospelheimin í 2002 eftir at fýra av teirra løgum koma á ein film, “A Walk to Remember”. Hetta førdi til eina størri fløguútgávu, The Beautiful Letdown, ið kom út 2003, har stakfløgan “Meant to Live” er á.

**Michael Tait** er eisini ein av teimum, sum slatrið hevur gingið um skal koma til festivalin. Tait er fyrrverandi limur úr Dc Talk. Hesin bólkurin gav út fimm fløgur, ið vórðu serliga væl móttiknar. Í 2000 avgjørdi bólkurin at steðga á, og limirnir í bólkinum fóru hvør sær víðari við sínum tónleiki. Hittið hjá Dc Talk, “Jesus Freak”, hevur ferðast kring tað mesta av heiminum í útvarpi og sjónvarpi. Eftir 2000 Tait spælt við sínum bólki, Tait Band,

**Pillar** er kent fyri hitt meiri tunga tónleikaslagið. Teir hava útgivið 5 fløgur, og ætlanin er, at bólkurin skal útgeva fløgu í oktober, við heitinum »The Reckoning«. Í tíðarritinum CCM Magazine varð bólkurin av lesarunum valdur at vera Best Hard Rock Band í 2006. At byrja við spældi bólkurin rap metal, men spælir nú tungan rock.

Fjarðafestivalurin verður hildin í Kelduni í Skálabotni og nærhendis samkomuhúsinum. Gospeltiltakið verður í síðsta parti av august mánað.

# Okkara Sangbók útkomin

**Nýggj sangbók er komin á marknaðin, bókin er eitt sindur øðrvísi enn Grøna Sangbók, við tað at fleiri útlendskir sangir eru við og so sjálvsagt teir slagararnir sum eru komnir ta seinastu tíðina**

Týsdagin var hugnalig samkoma í sambandi við at sangbókin, Okkara Sangbók, varð útgivin. Ikki so fá komu inn á gólvi í bókhandlinum Rit og Rák í SMS, hendan eftirmiddagin tiltakið fór fram. Á skránni var m.a. sangur, røða og eisini var okkurt leskiligt at fáa afturvið.



*Fleiri kend andlit úr føroyskum tónleiki vitjaðu, m.a. Kristian Blak og Hanus G. Johansen*

Bókin er skipa undir fylgjandi bólkaheitum: »Føroyingar, sum her nú koma saman«, »Barnahjartað alramest«, »Sertilfar«, og síðan »Í húnar hátt«, har tjóðsangur og flaggsangir eru við.

Tað er undir tí fyrsta bólkinum, at fleiri útlendskir slagarar eru komnir við. Harímillum eru tónlistafólk sum Evert Taube, Gasolin, Queen, The Everly Brothers og fleiri. Her finnur ein sangir, sum kunnu hóska til góðan felagssang. Ímillum sangirnar er lagið hjá Queen, »Bohemian Rapshody«, sum neyvan kann vera so lættur at tríva í hjá vanliga føroyinginum um hetta var ætlanini. Men uttan iva fara teir nýggju útlendsku og sjálvsagt teir føroysku sangirnir at krydda fleiri veitsluløtur og aðrar løtur, har høvið er til tess.

Í bókini er eitt væl skipað leitiyvirlit. Forlagið á Deild gevur Okkara Sangbók út, lagt til rættis hava Magni Olsen og Ernst S. Olsen.

**Jj**




*Tað var gravgangur eftir bókini, tey í Rit og Rák mettu at upp ímóti 300 eintøk vóru seld hendan eftirmiddagin*

## Ferðgáar til Miðvágs

**Landsverk fer at seta nakrar ferðgáar upp í Miðvági, men annars eru ongar ætlanir um at gera nakað við vandamikla vegin.**

FERÐSLA

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað liggja ongar ætlanir um at gera nakað við vegin í Miðvági í nærmastu framtíð. Tað staðfestir Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverk. - Vit fara fyrsta dagin at seta ferðgáar upp, og royndirnar við teimum siga okkum, at bilførararnir trýsta og bremsuna og minka um ferðina, tá teir síggja ferðgáarnar. Hetta verður eisini einastu tiltøkini beint nú, sigur stjórin á Landsverk. Ein ferðgái er hesi skeltini, sum standa við vegjaðaran og blinka, tá ið tú koyrir skjótari enn tú hevur loyvi til, og tað eru tílíkt skelti, sum Landsverk nú fer at seta upp í Miðvági.

- Tað ber ikki til at bara stilla nakrar forðingar upp her og har, tí hetta má viðgerast av teimum røttu fólkunum. Handla vit í óðum verki, so kann ringasta avleiðingin vera, at vit gera vegin nógv ótryggari enn hann er, sigur Oyvindur Brimnes. Hann vísir eisini á, at øll skelting og allar merkingar skulu viðgerast, og at hetta tekur tíð. - Vegamyndugleikar, kommunali myndugleikin og ferðslumyndugleikin skulu allir hava sítt at skula sagt, og tískil hendir onki frá degi til dags, staðfestir Oyvindur Brimnes.

### Allur bati bøtur

Rúna Sivertsen er formaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd. Hon sigur, at allur bati bøtur og ásannar, at hóast ferðgáar hvørki er besta ella næstbesta loysnin upp á trupulleikan av vegnum í Miðvági, so er tað eitt stig tann rætta vegin.

Hon sigur tó, at tað als ikki kann góðtakast, at onki er gjørt frá landsins síðu enn. - Vegurin skal vera gjørdur á ein slíkan hátt, at hann ikki leggur upp til, at bilarnir skulu koyra skjótt. Tað er eisini okkara heilt greiða meining, at allir landsvegir eiga at liggja uttan fyri bygt øki, sigur Rúna Sivertsen, sum er greið yvir, at tað hvørki hendir í dag ella í morgin, at vegurin í Miðvági verður lagdur út um bygdina. - Tað hevði tó verið tað optimala, men tá tað ikki ber til her og nú, so átti hámarksferðin at verið sett niður til 30 km/t, eins sum hon átti at verið allastaðni har børn spæla og familjur búleikast, staðfestir Rúna Sivertsen.

### Arbeiða av øllum alvi

Elias Næs er formaður í tekniskunevnd í Miðvágs kommunu. Hann veit at siga, at arbeiðið við vegnum í Miðvági byrjaði fyri nógvum árum síðani, men er eisini steðga upp fleiri ferðir.

Men nú er gongd aftur í málinum: - Vit høvdu fund við ein verkfrøðing 12. juni um, hvør besta loysnin til vegatrupulleikan er. Á fundinum løgdu vit nøkur hugskot fram um, hvussu vit ímyndaðu okkum at tað kundi verið gjørt, og verkfrøðingurin, sum arbeiðir av øllum alvi í løtuni, hevur lovað at venda aftur við einum uppleggi í fyrru helvt av august, sigur Elias Næs úr Miðvágs kommunu.

Hann sigur eisini, at ferðslan er nógv broytt síðani tunnilin kom. - Bilarnir koyrdu munandi skjótari gjøgnum bygdina áðrenn tunnilin kom, tí allir skuldu náa Sam. Men tá tunnilin kom og ongin Sam var, slakkaðu allir bilarnir av og ferðin minkaði heilt fitt, greiðir Elias Næs frá. Hann heldur tó, at seinastu tíðina eru bilarnir farnir at koyra skjótari aftur gjøgnum bygdina. Uttan at vita heilt hví so er, nevnir Elias Næs nógv øktu flogferðsluna sum eina møguliga frágreiðing.

Miðvágs kommuna fær tó ikki at gjørt nakað við, at bilarnir nú aftur eru farnir at seta ferðina upp, tá teir koyra gjøgnum bygdina. Meginparturin av bygdaráðnum er í feriu, og fyri at kunna gera nakað sum helst, má bygdaráðið vera savnað.

- Tað er heldur ikki til nógva nyttu, um vit handla fyrst og hugsa aftaná, sigur Elias Næs, formaður í tekniskunevnd í Miðvágs kommunu.

Við øðrum orðum mugu íbúgvarnir í Miðvági taka til takkar við ferðgáum til einaferð í august mánaði, tá eitt upplegg frá einum verkfrøðingi kemur um, hvussu viðurskiftini í bygdini kunnu betrast.